Reglugerð fyri handfaring av íløtum

Innihald

Við heimild í § 6, stk. 1, § 8, stk. 2, og § 9, stk. 2, í løgtingslóg nr. 40 frá 16. mai 2024 um pantskipan fyri íløt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 40 frá 21. mai 2026, verður ásett: 2
1. Handfaring av íløtum í posum (§ 6, stk. 1) 2
1.1 Krøv til nýtslu av posa 2
1.2 Fyll posan 2
1.3 Bílegg posar 2
1.4 Innsavnan 2
1.5 Avrokning 2
1.6 Endurnýtsluíløt 2
1.7 Pantposar og strips 2
1.8 Fløskuautomatur uttan komprimator 2
2. Góðkenning av fløskuautomatum 3
3. Handfaring av íløtum - fløskuautomat við komprimator 3
3.1 Íløt til innsavning 3
3.2 Uppseting fløskuautomat 3
3.3 Innsavnan 3
3.4 Avrokning 3
4. Góðkend móttøka (§ 8, stk. 2) 3
4.1 Fløskuautomat 3
4.2 Hølisviðurskifti 4
4.3 Atkomuviðurskifti 4
4.4 Minstukrøv til arbeiðsøkið 4
5. Felags móttøka (§ 9, stk. 2) 4
5.1 Krøv til støddd og innrætting 4
6. Tøkni og útgerð 5
6.1 Dátugrunnur 5
6.2 App og skannarar 5
6.3 Online-dagføring og tøknilig krøv til fløskuautomatir 5
6.4 Ábyrgd av rakstri og viðlíkahaldi av fløskuautomatum 6
6.5 Samstarv og tøknilig samskipan 6

Við heimild í § 6, stk. 1, § 8, stk. 2, og § 9, stk. 2, í løgtingslóg nr. 40 frá 16. mai 2024 um pantskipan fyri íløt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 40 frá 21. mai 2026, verður ásett:

1. Handfaring av íløtum í posum (§ 6, stk. 1)

1.1 Krøv til nýtslu av posa

- Øll íløt skulu í posar, um ikki annað er ásett í hesi reglugerð.
- Tað er bert loyvt at brúka pantposar, sum pantumsitarin hevur útflýggjað. Pantposarnir eru merktir við QR-kotu.
- Plast- og aluminiumsíløt skulu í stóra posa (pantposi 1)
- Glasíløt skulu í lítla posa (pantposi 2)

1.2 Fyll posan

- Tryggja, at íløt eru tóm, áðrenn tey fara í posan. Posin má í mesta lagi viga 15 kg.
- Fyll posan upp til strikuna.
- Latið posan aftur við strips.
- Onki brotið glas ella burturkast skal í posan.

1.3 Bílegg posar

- Posar verða bílagdir hjá IRF. Møguligt er at bíleggja posar talgilt ella við at ringja á tlf. 414243.

1.4 Innsavnan

- Sølustað kann eftir ynski fáa kvittan fyri talið av posum, áðrenn bilførarin fer avstað.
- Bilførarin skal sleppa ótarnaður og trygt eftir posum.

1.5 Avrokning

- Fyri at fáa pantið endurrindað, skal ílatið vera í so góðum standi, at uppteljingarmaskinan hjá IRF bæði fær handfarið ílatið og lisið strikukotuna.

1.6 Endurnýtsluíløt

- Endurnýtsluíløt skulu latast inn í kassum ella latin í lítla pantposa.

1.7 Pantposar og strips

- Pantposi 1 kostar 4,76 kr. stk. uttan mvg og pantposi 2 kostar 2,28 kr. uttan mvg. Pantposar verða krediteraðir so hvørt teir koma fullir inn til pantumsitaran at verða upptaldir.
- Posi við strips 100 stk. kostar 20 kr. uttan mvg.

1.8 Fløskuautomatur uttan komprimator

- Íløt, sum verða móttikin í fløskuautomatum, ið ikki komprimera íløtini, skulu handfarast eftir somu reglum og mannagongdum sum íløt í posum sambært hesi grein.

2. Góðkenning av fløskuautomatum

- Fløskuautomatir, sum skulu nýtast í pantaskipanini, skulu skrásetast hjá IRF og góðkennast av IRF, áðrenn tær verða tiknar í nýtslu.
- Góðkenningin er treytað av, at fløskuautomatin lýkur tey tøkniligu krøvini, sum eru galdandi fyri pantskipanina, og at staðfest er, at automatin kann senda og móttaka neyðugar dátur frá felags dátugrunninum hjá Pantumsitara í samsvari við hesi krøv.
- IRF hevur ábyrgd av at staðfesta, at treytirnar fyri góðkenning eru loknar.

3. Handfaring av íløtum - fløskuautomat við komprimator

3.1 Íløt til innsavning

- Plast- og aluminiumsíløt, sum eru knúst ella kroyst, verða latin í posar. Posar verða síðani stáplaðir á plattar. Tryggjast skal, at posar stáplaðir á plattar ikki lætt kunnu fella av plattinum, og tað er handfaringarvinarligt hjá IRF.
- Knúst glas skal latast í kassar, sum hava stødd og styrki samsvarandi vanligum fiskakassa. Kassarnir skulu vera gjørdir soleiðis, at teir, tá ið teir eru fyltir, kunnu stáplast og handfarast við trukki, herundir lyftast, vendast og tømast.
- Undantak frá hesi mannagongd skal avtalast við IRF.

3.2 Uppseting fløskuautomat

Fløskuautomat, sum komprimerar íløt, skal skilja tilfarið sundur í:

- Aluminium.
- Klárt plast.
- Litað plast.
- Glas til endurvinning (knúst).
- Glas til endurnýtslu (heil íløt, sum latast í kassar).

3.3 Innsavnan

- Bilførari skal sleppa ótarnaður og trygt eftir bingju, last, kassa ella posum.

3.4 Avrokning

- Avroknað verður eftir data frá fløskuautomat við komprimatori
- Fyri at avrokna sambært data, skal avtala gerast við IRF og veitara av fløskuautomat um uppseting av avrokningarfrágreiðing (financial report).

4. Góðkend móttøka (§ 8, stk. 2)

4.1 Fløskuautomat

Tað er eitt krav, at góðkend móttøka hevur fløskuautomat, sum komprimerar/kroystir øll íløt, ið koma inn, og skilur tilfarið sundur í hesar bólkar:

- Aluminium.
- Klárt plast.
- Litað plast.
- Glas til endurvinning (knúst).
- Glas til endurnýtslu (heil íløt, sum latast í kassar).

4.2 Hølisviðurskifti

- Móttøkan skal vera innilokað, turr, ljós og rein.
- Móttøkan skal hava vask og ruskspann, so kundin sleppur av við burturkast og fær vaskað sær um hendurnar.
- Hóskandi fermetrar skulu setast av til goymslu, sum rúma seks daga virksemi. IRF avgerð goymslustøddina í hvørjum einstøkum føri, har atlit verða tikin til virkisstødd.
- Økið, ið verður sett av til goymslu, skal vera undir taki ella í innilokaðum bingjum.
- IRF skal hava atgongd til at heinta íløt á goymsluni alt samdøgrið.

4.3 Atkomuviðurskifti

- Ljósviðurskiftini skulu vera so mikið góð, at tað ber til at savna tilfarið inn alt samdøgrið og í øllum veðri.
- Økið rundanum skal hava eina slíka stødd, at tað er gjørligt at savna inn tilfarið við lyftivogni, bili ella lastbili, alt eftir, hvat hóskar til støddina á virkseminum.
- Undirlagið, har tilfarið skal heintast, skal vera asfalterað, stoypt e.l.
- Um flutningsbingjur verða nýttar, skal undirlagið vera fast og tætt og tola 10 tons aksiltrýst.
- Flutningsbingjur skulu staðsetast soleiðis, at tað í minsta lagi eru níggju metrar frítt øki frammanfyri bingjuna, soleiðis at ein vanligur krókabilur kann heinta bingjurnar.
- Bingjur, staðsettar uttandura, skulu festast í lendið.
- Knúst glas skal latast í kassar, sum hava stødd og styrki samsvarandi vanligum fiskakassa. Kassarnir skulu vera gjørdir soleiðis, at teir, tá ið teir eru fyltir, kunnu stáplast og handfarast við trukki, herundir lyftast, vendast og tømast.

4.4 Minstukrøv til arbeiðsøkið

Frítt arbeiðsøki kring ein bil	minst 1 metur
Breidd á lastøki (bil + arbeiðsgeil)	minst 3,5 m – stórur bilur/trailari 4,5 m
Longd á lastøki	minst 10–12 m – stórur trailari 15–20 m
Frástøða frá gongubreyt/inngongd	minst 3 m
Trygdarfrástøða til onnur fólk	minst 5 m frá virkna lastøkinum
Frámerki	gular linjur, ketur ella rimagarður

5. Felags móttøka (§ 9, stk. 2)

Krøv til felags móttøku:

Hesi krøv lýsa, hvussu arbeiðsøkið rundan um goymslu, móttøku- ella innsavningarpláss skal innrættast, so arbeiðið við lastbili, lyftivogni og øðrum arbeiðstólum kann fara fram trygt og vandaleyst fyri fólk og útgerð.

5.1 Krøv til stødd og innrætting

- Bilførari skal sleppa ótarnaður og trygt eftir posum.
- Økið rundanum skal hava slíka stødd, at tað ber til at lasta og lossa tilfarið við lyftivogni, bili ella lastbili, alt eftir støddini á virkseminum.

- Við innsavning skal lastbilur kunna parkera í mesta lagi 5 metrar frá ílatagoymsluni.

Arbeiðsøkið skal gerast soleiðis, at tað er:

- Trygt at flyta tilfar inn og út.
- Nóg rúmligt at venda og bakka við akfari.
- Frítt uttan óneyðugar forðingar.
- Væl upplýst og sjónliga frámerkt.

6. Tøkni og útgerð

6.1 Dátugrunnur

Pantumsitari hevur ábyrgd av felags dátugrunninum, sum IRF Pant appin og allar fløskuautomatir í pantaskipanini fáa dátur frá. Pantumsitari skal tryggja, at dátugrunnurin virkar á fullgóðan hátt, verður dagførdur eftir tørvi og lýkur galdandi krøv til trygd og dátuvernd.

Pantumsitari hevur ábyrgd av, at dátur verða tøkar og sendar rætt frá dátugrunninum til appina og fløskuautomatirnar. Eigarin av hvørjari fløskuautomat hevur ábyrgd av, at automatin og neyðuga samskiftisútgerðin eru í fullgóðum rakstrarligum standi og kunnu senda og móttaka dátur í samsvari við tøkniligu krøvini í pantaskipanini.

6.2 App og skannarar

Pantumsitari mennir og umsitur Pant appina, sum er ein vevapp til at skanna strikukotur á íløtum og staðfesta, um íløtini eru fevnd av pantaskipanini. Pant appin er tann einasta appin, ið er góðkend til hesa nýtslu í pantaskipanini.

Sølustøð, sum taka ímóti pantíløtum, kunnu nýta appina á fartelefonum, teldlum og teldum við hóskandi vevkagara. Strikukotur kunnu skannast við myndatólinum á tólinum ella við einum tilknýttum strikukotuskannara.

Strikukotuskannarar, sum verða nýttir saman við appini, skulu vera samvirkandi við hana og lúka tey tøkniligu krøv, sum pantumsitari ásetur.

Pantumsitari hevur ábyrgd av rakstri, viðlíkahaldi og neyðugum dagføringum av appini, herundir at viðkomandi krøv til kunningartrygd og vernd av persónsupplýsingum verða hildin.

6.3 Online-dagføring og tøknilig krøv til fløskuautomatir

Fløskuautomatir skulu dagførast online av IRF, soleiðis at øll íløt, sum eru fevnd av pantaskipanini, verða skrásett sjálvvirkandi í automatunum, so hvørt sum tey verða skrásett í pantaskipanini.

Allar fløskuautomatir, sum verða nýttar í pantskipanini, skulu lúka tey tøkniligu krøv, sum eru ásett fyri skipanina, og vera tøkniliga samvirkandi við felags dátugrunnin hjá Pantumsitara. Automatirnar skulu tryggja, at innlatin íløt verða skrásett rætt, og at neyðugar upplýsingar verða sendar og móttiknar rætt og trygt millum automatir og dátugrunnin.

6.4 Ábyrgd av rakstri og viðlíkahaldi av fløskuautomatum

Eigarin av einstøku fløskuautomatini hevur ábyrgd av rakstri, viðlíkahaldi, reingerð og vaski av automatini, umframt neyðugum sambandi og samskiftislinjum.

Eigarin skal tryggja, at automatin hevur virkið netsamband við veitaran (t.d. Tomra), er í fullgóðum rakstrarligum standi og lýkur tey tøkniligu krøv, sum eru sett fyri pantaskipanina.

6.5 Samstarv og tøknilig samskipan

Pantumsitari og eigari av fløskuautomat skulu samstarva um at staðfesta og loysa tekniskar trupulleikar, sum ávikavist viðvíkja dátugrunninum, appini, dátuflutninginum ella sjálvari fløskuautomatini.

Hvør partur hevur ábyrgd av at rætta feilir, sum standast av viðurskiftum, ið hoyra undir teirra ábyrgdarøki.